Samstarvið gevur vitan

- Vit kunnu læra nógv av hesum samstarvinum, sigur Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúlanum í Havn. Báðir tekisku skúlarnir í Føroyum eru við í skipaðum samstarvi millum tekniskar skúlar í Danmark og í Grønlandi, og umboð fyri samstarvið hava júst verið í Føroyum

RANDI JACOBSEN

Nú eru 30 ár liðin, síðan teknisku skúlarnir í Norðurregiónini skipaðu seg í felagsskap.

Í Norðurregiónini eru teknisku skúlarnir í Ålborg, Skive, Viborg, Års, Thisted, Hjørring, Fredrikshavn, fýra skúlar í Grønlandi, Tekniski Skúlin í Klaksvík og Tekniski Skúlin í Havn.

Í seinastu viku vóru skúlastjórin í Skive, Hans Simonsen, og skrivarin fyri Norðurregiónina, Christian Pedersen í Føroyum og vitjaðu teknisku skúlarnar í Havn og í Klaksvík.

Teir høvdu eisini fund við Føroya Handverkarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, feløgini í Havn og í Klaksvík og við Føroya Arbeiðsgevarafelag. Haraftrat vóru fundir við Føroya Lærurað og við Landsskúlafyristingina.

Egon Øregaard heldur hetta tiltakið hava stóran týdning fyri Føroyar, og hann væntar, at í framtíðini verður samstarvið millum vinnuna í Føroyum, føroysku skúlarnar og donsku skúlarnar enn meira ment.

Í heyst varð gjørd ein samstarvsavtala millum teknisku skúlarnar í Norðurregiónini. Samstarvið umfatar skifti av lærarum, skifti av handverkslærlingum og øðrum næmingum og menning av lærarum og skúlum sum heild.



Frá vinstru: Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúlanum í Havn, Hans Simonsen, stjóri á Teknisk Skole Skive og formaður í Norðurregiónini, og Rúni Heinesen, stjóri á Tekniska Skúlanum í Klaksvík

Fundur í Føroyum

Ætlanin er næsta summar at hava regiónsfund í Føroyum næsta summar. Luttakararnir verða skúlastjórarnir og formenn fyri skúlarnar, tilsamans einir 45-50 luttakarar.

Eitt annað mál á skránni er eitt átak, sum verður á skúlanum í Skive í januar mánaði. Føroysku lestrarvegleiðararnir eru bodnir við, soleiðis at teir kunnu kunna donsku skúlarnar um føroysku handverksútbúgvingarnar umframt SIT og Atstøðisútbúgvingarnar. Tiltakið í Skive verður skipað sum opið hús ein leygardag, tá øllum stendur í boði at koma at síggja, hvat fyrigongur á skúlunum, hvussu næmingarnir arbeiða o.a.

- Tað kundi altíð hent, at teir koma heimaftur við onkrum hugskoti, sum vit kunnu brúka her í Føroyum, sigur Egon Øregaard.

Helst í Føroyum

Á fundunum nú varð tosað um teir mongu donsku skúlarnar, sum royna at fáa føroyingar á teir skúlarnar.

- Okkara felagsskapur hevur tað grundsjónarmið, at har vit hava útbúgvingarnar, eiga føroyingar at ganga í skúla í Føroyum, men í teimum mongu føroyingunum, har ikki ber til at fullføra handverksútbúgvingina í Føroyum, og í etimm sjáldsómu útbúgvingunum, har skúlagongdin fer heilt ella lutvíst fram á donskum skúlum, mæla teir til, at føroyingar fara á skúlarnar í økinum, sigur Egon.

Skúlarnir í Norðurregiónini hava nú gjørt eitt dagført og fullfíggjað yvirlit, umfatandi allar tøkniligar útbúgvingar, og hetta yvirlit vísir, hvørjir skúlar hava ávísu útbúgvingarnar, hvar ein næmingur kann byrja, og hvar útbúgvingin kann fullførast.

Báðir teknisku skúlarnir og vinnan halda væl um samstarvið.


Alt at vinna

- Eftir míni fatan, eru tað vit føroyingar, sum hava mest at vina í hesum samstarvinum. Vit fáa vitan og kunnu eisini læra av teirra royndum. Teirra vinningur er meira av eksotiskum slag, sum at sleppa ein túr til Føroya at halda fund og harvið síggja landið. Donsku skúlarnir fáa pening í mun til næmingatalið, men um teir so fáa nakrar næmingar um árið úr Føroyum, er tað bara sum ein dropi í havinum, sigur Egon Øregaard.

Nýggjar digitalstøðir

Í seinastuni hevur Telefonverkið fyrireikað umleggingina av telefonstøðunum í Søldarfirði, Leirvík og Fuglafirði, og hetta hevur havt við sær, at telefonsambandið undir hesum telefonstøðum hevur verið nakað órógvað.

Men ghárkvøldið vórðu hesar tríggjar støðirnar sløktar, og nýggja digitalstøðir settar til í staðin.



Nýtt bingospæl

Fráhaldsrørslan er nú komin við einum nýggjum bingospæli.

Spælið eitur EXPRESS BINGO.

Tað er ein seðil, sum er at fáa hjá Keypssamtøkunum runt landið, og teir verða eisini seldir við dyrnar. Seðilin kostar 10 krónur.

Á seðlinum er ein lúka at lata upp, og innanfyri finna vit tríggjar bingoplátur.

Yvirav plátunum eru 36 longu drigin bingotøl, og so er bara at fara til verka at krossa av.

Fyri hvørjar 1000 seðlar eru 180 vinningar fyr tilsamans 5.000 krónur. T.v.s., at nærum fimti hvør seðil vinnur, og helvtin av søluni fer til vinningar.

Full pláta gevur 1000 krónur, 4 rød 500 krónur, 3 rød 300 krónur, tvey rød 50 krónur, og fyri eitt rað er vinningurin nýggjur seðil, sum fæst frá seljaranum.

Vinningarnir eru gávukort frá Keypsamtøkuni.

Peningurin, sum kemur inn, fer til fráhaldsarbeiðið á Fjalsgarði, sum fráhaldsrørslan eigur. Ætlanin er, at bæði limáfeløg hjá fráhaldsrørsluni, onnur feløg, áhugabólkar, skúlaflokkar o.o. fyri henda pening skulu kunna hava tiltøk, sum á ein ella annan hátt hava við fráhaldsarbeiði at gera, á Fjalsgarði, uttan at gjalda fyri gistingina.

Konsert í Listaskálanum

Hóskvøldið kl. 19.30 hava Johannes Andreassen og Sámal Petersen konsert í Listaskálanum.

Johannes spælir klaver og Sámal violin.

Á skránni eru verk eftir Händel, Dvorak, Beethoven, Pugnani og Kreisler. Haraftrat verður klaverstykkið »Ælaveður« eftir Paula í Sandagerði framført. Hetta er júst stykkið, sum Pauli nýtti sum grundarlag undir klaverkonsertini, ið Føroya Symfoniorkestur nýliga framførdi.

Sámal hevur sína útbúgving úr Odense, við seinni skeiði í Wien. Hann virkar nú sum violinlærari í Tórhavnar Musikkskúla, har hann millum annað undirvísir eftir kendu Suzuki skipanini.

Johannes Andreasen lærdi í Wien við sinni skeiði í London. Umframt at undirvísa í Havn undirvísir hann eisini á Stranda- og Nes Sóknar Musikkskúla.

Í eitt trý ára skeið hevði hann klaverfylgispæl við musikkskúlan í Kópavági í Íslandi.

Sámal og Johannes teljast millum okkara virknastu kamartónleikarar, og teir eru báðir í tónleikabólkinum »Aldubáran.«

Konsertfelagið og Kunningarstovan skipa fyri konsertini hóskvøldið.



Johannes við klaverið

Elprísir lækka

Á árliga umboðsnevndarfundinum fríggjadagin góðkendi umboðsnevndin rakstrar-, fíggjar- og byggiætlanina fyri 1998.

Á triðja ári **lækka** elprísirnir - hesaferð við 3 oyrum/kWh. Elprísurin er ikki hækkaður seinastu 7 árini, og skal eitt vanligt húsarhald frá 1. januar 1998 rinda 1,27 kr./kWh ella tað sama, sum fyri 14 árum síðani, meðan ídnaðarin skal rinda 0,78 kr./kWh ella tað sama, sum fyri 17 árum síðani. Nevndu elprísir eru uttan MVG.

Í løgurnar í 1998 verða 80,1 mió. kr. harav 40 mió. til Eiði III.

Roknskapurin fyri 1996 varð eisini góðkendur. Rakstrarúrslitið eftir avskrivingar varð 15,2 mió. kr., og fíggjarstøðan pr. 31.12.1996 javnvigar við 584,3 mió. kr. Langfreistaða skuldin við árslok 1996 var 420,8 mió. kr.